# Hotel Runavík, Sjómansheimið

*Sjómansheimið er opið:*
*Gerandisdagar frá 7.30-23.00*
*Sunnu- og halgidagar frá 8.30 - 23.00*



Til jóla hava vit góð tilboð s.s.

**Forrættir**

**Aspargessuppa**
v/ flutes

**Rækjubland**
v/ breyð & smør

**Høvuðsrættir**

**Oksasteik**
v/ rómabakaðum eplum, grønmeti, agurkesalat og brúnari sós

**Lambasteik**
v/ reyðkáli, agurkesalat, hvít og brún epli og sós

**Fleskasteik**
v/ grønmeti, hvít og brún epli, sós og reyðkál

**Omaná**

**Fríska frukt**
v/ rákrem

**Rís a la Mande**



**Prísir**
Høvuðsrættur **100 kr.** 2 rættir **120 kr.** 3 rættir **140 kr.**

**Eisini hava vit dunnur o.a. Ringi og fái meira at vita**

**Jólaplattur á 98 kr.**
Kjøtfrikadellir v/ eplasalat
dunnu, rivjasteik,
egg og sild,
rækjur ella laks,
fruktsalat og Rís a la Mande
v/ breyð og smør

**Eisini kann bíleggjast út av húsinum**

**Hjartaliga vælkomin á Runavíkar Sjómansheim**

*tlf. 447420 · fax 448830 · e-mail: hotell@post.olivant.fo*

---

**Ferðaseðlar**
Áarvegur 6
FO-110 Tórshavn
Tel +298 34 00 00
Fax +298 34 00 11
e-mail travel@ff.fo
www.flogfelag.fo

**Flogfrakt**
Hoydalsvegur 17
FO-110 Tórshavn
Tel +298 34 00 30
Fax +298 34 00 31
e-mail cargo@ff.fo
www.flogfelag.fo

## Um allar leiðir



FLOGFELAG FØROYA

---

# *Fólk til oljufýrtænastuna í Suðuroy*

**Til oljufýrtænastuna hjá Statoil í Suðuroy søkja vit eftir dugnaligum og ágrýtnum fólki.**

Arbeiðið fevnir um at hava árligt eftirlit við oljufýrunum hjá teimum, sum hava Oljufýrtænastuna.

Umframt at taka tær av árliga eftirlitinum, kemur tú eisini at hava tilkallivakt - vanligar dagar frá 8.00-23.00. Í vikuskiftum og halgidagar frá 10.00-23.00.

Tað er ein fyrimunur, um tú ert elektrikari, VHS- ella maskinlærdur.

Løn sambært avtalu.

Hevur tú spurningar viðvíkjandi starvinum, ert tú vælkomin at venda tær til Statoil á Viðarnesi, telefon 34 35 00 og tosa við Hans Waag.

Umsóknarfreistin er 23.11.2001.

Skrivlig umsókn við avriti av møguligum prógvum og viðmælum skulu sendast til:

**STATOIL**
*á Viðarnesi, postsmoga 3098*
*FO-110 Tórshavn*

---

# Maskinmaður hjá PureWater

**Til maskindeild okkara søkja vit eftir maskinmanni**

**Starvið**
Sum maskinmaður fært tú, sum partur av maskindeild felagsins, ábyrgd av rakstri og viðlíkahaldi av maskinum og bygningi.

**Høvuðsuppgávur**
- Tryggja at viðlíkahald av maskinum og bygningi verður gjørt til ásetta tíð, uttan at nerva framleiðsluna
- Tryggja at teknisk viðurskifti á virkinum eru á einum høgum tekniskum støði.
- Verða við til at skipa og menna framleiðsluskipanina, soleiðis at framleiðslan verður so rationel sum til ber, og í hesum sambandi verða við til at finna nýggjar leiðir.
- At verða við til at skapa eitt trygt og gott arbeiðspláss, har arbeiðsfelagar koma at trívast.

**Førleiki**
Vit rokna við at tú hevur handverkaraútbúgving við møguligum yvirbygningi.
Kunnleiki til køli- og elskipanir er ein fyrimunur.

**Setanarviðurskifti**
Maskinmaðurin er partur av maskindeild felagsins, sum hevur beinleiðis tilvísing til leiðslu felagsins

Lønin verður sett eftir útbúgving og royndum.
Skrivlig umsókn við upplýsingum um royndir og útbúgving skal sendast til:

**Sp/f PureWater**
Faktorsvegur 6
Postboks 66
700 Klaksvík

Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði, og freistin at lata inn umsókn er 15. november 2001.

PureWater Seafoods

*PureWater er eitt virkið sum framleiðir og selur portiónir og blokkvørur úr laksi, upsa, hýsu og toski. Tað arbeiða 60 fólk á virkinum*

---

# Skattalistin

Skattalistin fyri Skála Kommunu fyri árið 2000 liggur frammi til alment eftirlit á Kommunuskrivstovuni frá 12. november til 26. november 2001.

**Skála Kommuna**

---

# Sethús á Tvøroyri til sølu

Um hóskandi boð fæst, eru sethúsini á matr. nr. 691 a til sølu.

**Tlf. 371656 og 255556**

---

# Fólk søkist

Fólk yvir 18 ár søkist til grillbar. Skiftandi vaktir at velja ímillum.

**Grill 2000**
Ring tlf. 213388
fax 316290



# Føroya Tele søkir eftir fólki til Fíggjardeildina

"Annað er til í verðini enn pengar, td. kekkar og gjaldskort!"
Ókendur



Til okkara Fíggjardeild verður søkt eftir einum fólki at byrja 1. januar ella skjótast gjørligt. Nýggja fólki skal luttaka í menningini av fíggjarfyrisitingini og -stýringini av fyritøkuni.

Á Fíggjardeildini starvast 4 fólk. Uppgávurnar vera, saman við hinum starvsfólkunum á Fíggjardeildini, at vera við í menningini av niðanfyristandandi uppgávum:

- ársroknskapur og aðrir tíðarroknskapir
- fíggjarætlan, uppfylging av fíggjarætlanum v.m.
- virkisøkisroknskapir
- gjaldførisuppgerðir
- viðlíkahald av annleggskartoteki, herundir uppfylging av íløgum
- skrivligar mannagongdir v.m.
- ymsar ad hoc uppgávur

Vit kunnu bjóða eitt starv í einum mennandi og avbjóðandi umhvørvi.

**Førleikakrøv:**
Tann, sum settur verður, skal hava hægri útbúgving innan búskap ella roknskap (cand. merc. aud., cand. merc. økonomistýring, HD (R) e.l.) ella hava hollar royndir og førleika innan roknskapararbeiði frá líknandi størvum ella frá grannskoðara. Eisini verður dentur lagdur á, at viðkomandi hevur

- hollan EDV-kunnleika
- góð samstarvsevni
- evni at arbeiða sjálvstøðugt

Eftir nýggjár letur Føroya Tele upp egnan integreraðan dagstovn í samstarvi við Tórshavnar Kommunu, har starvsfólk á Føroya Tele hava framíhjárætt til ansingarpláss.

Lønin verður sambært avtalu millum Føroya Tele og avvarðandi yrkisfelag ella samsvarandi førleikum

Gjøllari upplýsingar um starvið kunnu fáast við at venda sær til Heina Joensen, fíggjarstjóra, tlf 303030, lokal 3297.

Umsóknir við avriti av prógvum, møguligum ummælum og C.V. skulu vera Føroya Tele í hendi í seinasta lagi hósdagin 15. november 2001.

Umsóknir skulu sendast til:

**Føroya Tele**
Att.: Starvsfólkadeildin
Postsmoga 27
110 Tórshavn

**Føroya Tele hevur, sum ein týðandi partur í føroyska samfelagnum, ábyrgdina av meginpartinum av fjarskiftisflutninginum í Føroyum. Menningin innan fjarskiftisøkið gongur sera skjótt. Hetta setur stór krøv til fyritøkuna og starvsfólkið, herundir eisini til starvsfólkið í fíggjarøkinum.**

FØROYA TELE
*Skapið framtíðina saman við okkum!*

---

# Fólkatingsvalið

**Valkort**
Til fólkatingsvalið, sum verður 20. november 2001, verða valkort send øllum veljarum í kommununi.
Um onkur, sum heldur seg hava atkvøðurætt, ikki hevur fingið valkort, ella okkurt annað er komið skeivt fyri, skal viðkomandi siga frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 16. november 2001, kl. 15.00.

**Brævatkvøður**
Veljarar í Vestmanna Kommunu, sum sambært vallógini lúka treytirnar fyri at greiða brævatkvøðu, kunnu atkvøða á kommunuskrivstovuni til og við 16. november 2001, kl. 15.00.
Tey, ið vegna sjúku ikki eru før fyri at koma á valstaðin, og sum ynskja at greiða brævatkvøðu heima, kunnu boða frá hesum á kommunuskrivstovuni í seinasta lagi 16. november 2001, kl. 15.00.

**Valið**
Valið fyri veljarar í Vestmanna Kommunu og á Válinum fer fram á kommunuskrivstovuni í Vestmanna týsdagin 20. november 2001.
Atkvøðugreiðslan fer fram frá kl. 9.00 til kl. 20.00 ella til støðugur kemur í eftir kl. 20.00.

**Vestmanna Kommuna**

---

# Kunngerð

Tað verður hervið gjørt kunnugt, at fólkatingsvalið týsdagin 20. november 2001 fer fram á kommunuskrivstovuni í Kvívík fyri bygdirnar Kvívík, Stykkið, Leynar og Skælingur.
Fyri bygdirnar Válur og Nesið fer valið fram á vanliga valstaðnum í Vestmanna.

Veljarar, sum eru burturstaddir valdagin, kunnu í seinasta lagi leygardagin 17. november 2001 greiða brævatkvøðu við at venda sær til kommunuskrivstovuna ella formannin í valnevndini fyri Kvívíkar Kommunu, Petur Müller, tlf. 421201.

Veljarar, sum vegna sjúku ella sambært vallógini á annan hátt lúka treytirnar fyri at velja heima, kunnu boða kommunuskrivstovuni frá í seinasta lagi mánadagin 19. november 2001, kl. 16.00.

Atkvøtt verður frá kl. 9.00 til kl. 20.00 og heldur fram inntil steðgur kemur í.

Valkort verða send út og skulu havast við tá atkvøtt verður. Veljari, ið ikki hevur fingið valkort ella hevur fingið valkort við villum, eigur at venda sær til kommunuskrivstovuna skjótast gjørligt ella í seinasta lagi 16. november 2001.

**Kvívíkar Kommuna**

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3255
Navn: Sp/f Fartal
Adressa: c/o Hallbera Ó Kristiansen, 510 Gøta.

Kommuna: Gøtu Kommuna
Stovningardato: 01.11.2001
Viðtøkudato: 01.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: Hallbera Ó Kristiansen, 510 Gøta.
Stjórn: Hallbera Ó Kristiansen, 510 Gøta.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av stjóranum.
Grannskoðari: : Sp/f Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.02. - 31.01
Fyrsta roknskaparár: 01.11.2001 - 31.01.2002
Endamál: Endamál felagsins er at reka íløguvirksemi, handil og ídnað, herundir keyp og søla av fastari ogn.

Skráseting Føroya tann 8. november 2001

Kristin Balle

---

**Skráseting Føroya hevur í dag skrásett niðanfyri standandi smápartafelag:**

Skrásetingar-nr. Sp/f 3260
Navn: Sp/f 06.11.2001
Adressa: Á Túgvu 1, 100 Tórshavn.
Kommuna: Tórshavnar Kommuna
Stovningardato: 06.11.2001
Viðtøkudato: 06.11.2001
Kapitalur: Kr. 80.000,00
Inngjaldingarháttur: : Kontant kr. 80.000,00 til kurs 100.
Stovnari: P/F J & K Petersen, Sigmundargøta 13, 100 Tórshavn (P/F 1349).
Stjórn: Ragnhild Anóra Petersen, Á Túgvu 1, 100 Tórshavn.
Tekningarreglur: Felagið verður teknað av einum stjóra.
Grannskoðari: : P/F Rasmussen & Weihe, á Glaðsheyggi, 100 Tórshavn.
Roknskaparár: 01.01. - 31.12
Fyrsta roknskaparár: 06.11.2001 - 31.12.2002
Endamál: Endamál felagsins er at eiga og reka ognir, at reka entreprenørvirksemi og annað virksemi í hesum sambandi.

Skráseting Føroya tann 8. november 2001

Kristin Balle

---

Sosialurin -har tað hendir

Sosialurin
www.sosialurin.fo